Søla

M/F Tróndur

SL fara við hesum, vegna landið, at lýsa M/F Trónd til sølu fyri hægstbjóðandi.

Tekniskar kravspecifikatiónir

Almennar upplýsingar
Slag av fari: ferðafólk og akfarsferja
Byggiár: 1959
Kapasitetur
Ferðafólk: 205/149
Akfør: 15
BRT/NRT: 399/212
Maskinarí
2 stk. Wichmann x 600 HK

Tilboð
Tilboð, merkt Søla M/F Tróndur, skulu vera innkomin til:

Tor-Shipping, sp/f
N. Finensensgøta 23
Box 1252
FO-110 Tórshavn

í seinasta lagi 17. desember 2001, kl. 12:00.

Nærri upplýsingar um M/F Trónd kunnu fáast við at venda sær til Tor-Shipping.

Tlf. 318531 ella t-post: torship@post.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutn-

Søla

M/F Pride

SL fara við hesum, vegna landið, at lýsa M/F Pride til sølu fyri hægstbjóðandi.

Tekniskar kravspecifikatiónir

Almennar upplýsingar
Slag av fari: ferðafólkaskip
Byggiár: 1961
Kapasitetur
Ferðafólk: 225/160
Akfør: ongi
BRT/NRT: 209/123
Maskinarí
1 stk. Vølund 550 HK

Tilboð
Tilboð, merkt Søla M/F Pride, skulu vera innkomin til:

Tor-Shipping, sp/f
N. Finensensgøta 23
Box 1252
FO-110 Tórshavn
í seinasta lagi 17. desember 2001, kl. 12:00.

Nærri upplýsingar um M/F Pride kunnu fáast við at venda sær til Tor-Shipping.

Tlf. 318531 ella t-post: torship@post.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutn-

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Sosialurin i Sosialurin

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

MITSUBISHI PAJERO 2.3 TD
til sølu. Minsta boð 20.000. Nógvir eykalutir eru við í keypinum. Áhugað vinarliga ringið á
tlf. 211543

CITROËN SAXO 1,5 DIESEL
Árg. 3/99, koyrt 119.000 km, silvurgráur, klárar 23,3 km/l. Nýggir lutir: 1. partur av útstoytinum, bremsiklossar, bremsuskivur, allar 4 gløðistiftirnar, camreim, reim til dynamo. Tað er júst skift motorolja, filtur, kølaraveska, koblingsveska, bremsiveska, er sum nýggjur, til sølu fyri 90.000 kr.
Tlf. 421422 / 256850

OPEL KADET
Árg. 87. Koyrt 140.000 km. Lakkerður fyri 2 árum síðani. Sýnaður juli 01. Koyrir væl og sær gott út. Prísur 13.000 kr. Ring á tlf. 311255 millum kl. 8.00 og 16.00 og á
tlf. 311224 e. kl. 16. Spyr eftir Finn

FELGUR
17'' Aex Bimo v/ 215/40 Firestone dekkum, lítið slitin, passa til Nissan Bluebird og Primera, til sølu fyri 10.000 kr. Nýprísur 14.000 kr.
Tlf. 226828

FÝRA PÍKADEKK TIL SØLU
Std. 155x80x13, bert brúkt ein vetur.
Tlf. 447143

EYKALUTIR YNSKJAST
til ein Mitsubishi Galant, árg. 87.
Tlf. 252368 / 448868

FORD ESCORT 1.3
árg. 89 til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 422100

TIL SØLU
Tvey dekk 205/50-15, óbrúkt 1.000,- kr. Eitt dekk 205/60-15, óbrúkt 500,- kr. Eitt dekk 185/65-15 200,- kr. Fýra píkadekk – góð – 185/65-15 kr. 1.600,- Fýra felgur 175/65-14 kr. 1.500,-
Ring 441548 eftir kl. 18

CITROEN BX
árg. des. 89, koyrt 122.000 km, sýnaður 19.11.2001, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 219610

MAZDA DEMIO
1.3, árg. 99, koyrt 49.000 km, til sølu fyri 90.000 kr. Biligari bilur kann ganga inn í keypið.
Tlf. 448935

BMW 325i
Árg. 86, nýsýnaður, í góðum standi, píkadekk á felgum fylgja við, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 312037

OPEL KADET SEDAN 1.3
árg. 87, til sølu fyri 2.000 kr. Koyrir, annars fínur til eykalutir. Góð píkadekk.
Tlf. 316580

MERCEDES BENZ 300
árg. 80, við autom. gearum, koyrir enn, men kann eisini nýtast sum eykalutir. Kostnaður 5.000 kr.
Tlf. 310345

SUZUKI SWIFT
Árg. 88 til sølu, koyrt 44.000 km, er nýsýnaður.
Tlf. 310735

TIL SØLU
Ein VW transporter, árg. 89, nýsýnaður. Toppstykkið er farið.
Tlf. 223857 / 455986

VW GOLF III
1,9 Turbo diesel 79 Hk, er til sølu, um hóskandi boð fæst. Bilurin er frá september 1993 og hevur koyrt 220.000 km. Er væl viðfarin.
Tlf. 215727

YNSKIST
Dieselmotorur í góðum standi, til ein Nissan Bluebird ynskist til keyps, ella ein bilur, ið hevur dieselmotor (Nissan Bluebird)
Ring tlf.257484

YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur ein gearkassa til Mitsubishi Lancer GLX ella Colt til sølu, so ring vinarliga á
tlf. 222941

YNSKIST
Eykalutir til Toyota Carina 2, árg. 89.
Tlf. 226772

4 PÍKADEKK
á felgum, std. 185/65-14, við orig. skálum, til Nissan Almera, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 448841

VW JETTA 1.6
155.000 km, árg. 86/87, koyrir fínt, alt fungerar, 4 summardekk á felgum, 4 nýggj píkadekk á felgum. Prísur 14.000 kr.
Tlf. 223980

TIL SØLU
Takboylar, passa til Honda Accord, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 319310

TIL SØLU
Tvey Bridgestone píkadekk til sølu fyri 300 kr. stk. Stødd 165 R 13.
Tlf. 319310

TOYOTA CAMRY 2.0 GLi
Árg. 89, el-rútar, el-spegl, sentrallás, aut. gear, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 223203

MITSUBISHI COLT
árg. 85, til sølu sum eykalutir.
Tlf. 224463

JEEPUR
Mitsubishi L200, árg. 2000, koyrt 23.000 km, til sølu. Eyka felgur fylgja við.
Tlf. 314709

TOYOTA AVENSIS
Reyður, árg. 8/99, koyrt 27.000 km, til sølu fyri 133.000 kr.
Tlf. 448902

HONDA ACCORD 2.0 EXI
til sølu vegna flyting. Hevur nógva eyka útgerð. Prísuppskot 85.000 kr. Ring og hoyr nærri á
tlf. 256460

Amboð

TIL SØLU
Metaldreygubonkur til sølu fyri 5.000 kr. Er tveir metrar langur og hevur brúgv.
Tlf. 317414 - 226315

Arbeiði

FLISEARBEJDE
Mindre indedørs flisearbejde udføres
tlf. 314434

REINGERÐING
Kvinna søkist til reingerðing 2 tímar um vikuna.
Tlf. 313520 e. kl. 18.00

Barnaútgerð

KOYRISTÓLUR
Næstan einki brúktur, svartur koyristólur til sølu við posa og regnslagi. Sær út sum nýggjur.
Tlf. 316240

TIL SØLU
Tvær babyliftir, 50 kr. stk. Ein grulvigarður úr træi, 100 kr.
Tlf. 319440

Bátaútgerð

VÍKINGUR 900
Framúr útróðrarbátur, longd 9,60 m, breidd 3,40 m við stórari last. 12 stk. 350 l. kassar. Motorur Cummins 300 Hk. Báturin er til sølu uttan fiskiloyvi. Hann er eisini væl egnaður til alivinnu og ferðafólkaflutning. Nærri fæst at vita við at ringja á
tlf. 332379 ella 210379

VEIÐILOYVI
Søkt verður eftir einum gomlum træbáti, 8 ella 10-mannafari, við veiðiloyvi til keyps.
Áhuga kunnu ringja tlf 423341

SNELLUR
Heilautomatiskar vágasnellur til sølu.
Tlf. 441981

27 GLASTREVJABÁTUR
Mørebas 27 glastrevjabátur til sølu, báturin er útgjørdur við : 4 Oljutrýst snellum, 1 Kraftblokk/-Línuspæl, 1 Gassfýring (heitluft í logari), 1 EL-snella, 1 GPS (Garmin 38), 1 Plottari (Ctrek), 1 VHF (Sailor), 1 16 fj. Radara (JRC 1000), 1 Farvi ekkolod (Furuno FCV-665), 1 Viking bjargingarbátur typa 04 UK, 1 Spulipumpa á dekkinum. Báturin hevur wc. Motorur er ein Ford-Saab 96 hk. Reguleringsgreiðir inni/úti. Róðurgreiðir inni/úti. Báturin hevur fiskiloyvi. Báturin verur seldur fyri 250.000,00 ella hægsta boð yvir. Áhugaðir kunnu ringja á tlf. 217487 ella eftir kl 18 á tlf 317487.
tlf. 217487

TIL SØLU
Furuno 24 fj. radari, 5.000 kr.
Furuno farvulodd, 1.000 kr.
Koden Loran C, 500 kr.
Hálvautom. oljutrýstsnella, 2.500 kr.
Dupult, rustfrí línurenna, 5.000 kr.
Línurenna til føroyskan bát, 1.500 kr.
Tlf. 252546

Bingo

RÆTTING
viðvikjandi jólabingo hjá AB-stuðlum: Bingo verður ikki 6. desember, men mánadagin 3. des.
Stuðlafelagið hjá Argja Bóltfelag

BINGO
verður í B36-húsinum sunnudagin 2. des. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. 6. og 12. spæl 800 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl. Koyring heim. Á lutaseðli m.a. trý gávukort á 1.000 kr.
B36-stuðlar

FRÁ STRÁLUNI
Gott jólabingo verður á Strondum sunnudagin 2. des. kl. 17.00. Burturlutað verða m.a. tvey føroysk krov, gávukort, dunnur og karamellur. Eisini verða lúkur at lata upp.
Strálan

FRÁ BÁRUNI
Stórt dunnubingo verður í Skálanum mánakvøldið 3. des. kl. 19.30. Ílalt verða uml. 150 dunnur at vinna. Høvuðsvinningur: Ein ótrúliga stórur jólapakki við alskyns vinningum. Seinasta bingo í ár.
Bygdarfelagið Báran í Arnafirði

AB-STUÐLAR – JÓLABINGO
AB-stuðlar skipa fyri góðum jólabingo í Róðrarneystinum á Árgjum mánadagin 3. desember kl. 19.00. Tvey føroysk krov verða burturlutaði og nógv annað gott verður at vinna. Eykaspæl verður. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Stuðlafelagið hjá Argja Bóltfelag

RIMMAR JÓLABINGO!
verður í Framtíðini 13.12. kl. 19.30. Annaðhvørt bingo tvær dunnur og annaðhvørt ein karamellueskja. Høvuðsvinningur á lutaseðli m.a. balja við alskyns jólamati. Eykaspæl verður aftaná. Søla av kaffi og ris á la mande verður í steðginum.
7. fl. í Vágs skúla

GOTT JÓLABINGO
verður í Bygdarhúsinum í Hósvík leygardagin 1. desember kl. 16.00. At vinna m.a. ræst kjøt, karamellur, full pláta 400 kr.
Funnings Bygdarfelag

RIMMAR BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum 29. nov. kl. 19.00. At vinna: før. krov, døgurðamatur, karamellur, gávukort, dunnur o.a. Eykaspæl. Koyring heim.
Argja Róðrarfelag

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 1. des. kl. 16.00.
Eldrafelagið Borgin

HEY, SUÐUROYINGAR
Rimmar jólagása bingo verður í skúlanum í Trongisvági mánakvøldið 3. des. kl. 19.00. 12 føroyskar gæs, føroyskt kjøt og nógv annað gott verður at vinna. Karamellueskja verður burturlutað millum hvørt spæl. Á lutaseðli 12 lutir, m.a. olja, gæs, føroyskt kjøt, fiskur og nógv annað gott. Eykaspæl verður eisini.
Flogbóltsdeildin T.B.

FØROYSKT FELAG Í BALLERUP
Sunnudagin 2. desember kl. 15.00 spæla vit BINGO fyri børnum og vaksnum í »Loen« á Ryttergården í Pederstrup nærhendis Ballerup. Vinningarnir eru ferðir København/Oslo við DFDS, føroyskur matur, leikutoy og spøl, jólakurv, bøkur og mangt annað gott. Tú kanst eisini vinna APEX-ferð Danmark/Føroyar við Atlantic Airways. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Føroyskt Felag í Ballerup

KAGGIN
Gott jólabingo verður leygardagin 1/12 kl. 15 fyri børnum og kl. 19 fyri vaksin. Nógvir góðir vinningar m. a. føroyskar dunnur, gæs og ræst før. kjøt. 15 vinningar á lutaseðli m. a. jólakurvar og før. krov. Eisini verður spælt bingola og eykaspæl. Kaggin ynskir øllum sínum bingospælarum eini gleðilig jól.
Kaggin

JÓLABINGO
Stórt og gott jólabingo verður í Pálsstovu hóskvøldið 29. nov. kl. 19.00. At vinna verður m.a.: Uttanlandsferð fyri tvey, Nintendo 64, turt kjøt, ræst kjøt, gás, rækjur, karamellur, ferð við Norðlýsinum og grindaknívur. Eykaspæl verður.
9. B í Kommunuskúlanum

BARNABINGO
Gott barnabingo verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 8. desember kl 15. Nógv gott verður at vinna. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

TIL SØLU
»Historiske malerier« af P.P., 7 bind í gotiskum stavum, frá 1880-unum, 140 kr. Paul Mahalin »Musketerernes ætling«, 1977, 80 kr.
Tlf. 220660 - 321915

TIL SØLU
Theodor Kittelsen »Tekst, tegninger og malerier«, 400 bls., 100 kr. Anus Mundi »5 ár i Auschwitz, 30 kr.
Tlf. 220660 - 321915

TIL SØLU
»Mindy«, dansk bogforlag, 1983, 20 kr. »Kammerat Jesus«, 1979, 20 kr.
Tlf. 220660 - 321915

TIL SØLU
»Den tavse verden« í teksti og myndum, 30 kr. »Nordiske gude og heltesagn«, 1984, 80 kr.
Tlf. 220660 - 321915

TIL SØLU
»John F. Kennedys sidste rejse« í myndum, 30 kr. »Det Bedstes bøger«, 4 stk., 80 kr. ialt.
Tlf. 220660 - 321915

TIL SØLU
»Nordisk konversationsleksikon«, 5 bind + leksikon árbogen, sum nýtt, 1.500 kr.
Tlf. 220660 - 321915

TIL SØLU
2 bind »Claudius Messias« 1978, ialt 30 kr. »I havets midte«, Samuel Agnon, 1968.
Tlf. 220660 - 321915

TIL SØLU
»Fredløse menn« 1967, 20 kr. »Krøblingen fra Nürnberg« 1959, 20 kr. »SOS Atlantic Whipper«, 15 kr. »Tale i røret« 1981, 15 kr. »Kaptajn fra Bombay«, 20 kr.
Tlf. 220660 - 321915

TIL SØLU
»Scott Amundsen« 1979, 60 kr. »Stjernehimlen og dens vidundre«, stór bók, 100 kr.
Tlf. 220660 - 321915

TIL SØLU
»Købmandens haandbog« 1916, 680 bls., 80 kr. Forlaget Fremad: 50 innbundnar bøkur, stuttsøgur, frá 1955-, 150 kr. ialt.
Tlf. 220660 - 321915

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Eg havi mist mína fartelefon burtur leygarkvøldið 18. nov. Hevur nakar funnið? Vildi fegin havt sim-kortið aftur.
Cecilia, tlf. 371818

HJÁLP!
Einar brillur mistar uttan fyri Tórshøll tann 19.10. Hevur nakar sæð tær, so ring
Tlf. 312564

SILVURKROSSUR
við ketu burturmistur vikuskiftið 26-27 okt. Um onkur hevur funnið hann, vinarliga ring á
tlf. 313914

HARRA HÁLSKETA
úr silvuri burturmist náttina til leygardagin 17. nov. í miðbýnum í Havn. Øivað tætt við Steinatún. Hevur tú funnið hana, vinarligast ring til mín,
Tlf. 255215

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki